# Sylla aftur á blettinum

Seinasta leikumfar fekk Amed Davy Sylla debut hjá FC Amager, og hann skuldi bara nýta hálvan tíma á vøllinum, áðrenn hann hevði skorað sítt fyrsta mál fyri nýggja felagið. Um vikuskiftið fekk hann so møguleikan frá byrjan, tá ið FC Amager hevði vitjan av botnliðnum, Lolland Falster Alliancen. Eftir hálvum tíma legði Sylla FC Amager á odda 1-0, meðan Daniel Udsen stutt fyri hálvleik økti til endaliga úrslitið, 2-0 til FC Amager, sum við sigrinum lyfti seg av niðurflytingarplássinum.



# Áhugað í eykamálmanni

Tottenham, Arsenal og Everton eru áhuga í at keypa eykamálmannin hjá Wolverhampton, sum spælir í næstbestu ensku fótbóltsdeildini. Evnaríki Wayne Hennessy, sum er 20 ára gamal, hevur mist plássið á liðnum, tí halda stóru feløgini í Premier League, at tey kunnu keypa hann. Men venjarin hjá Wolverhampton vil ikki selja eykamálmannin, sum hevur sáttmála við Wolverhampton til 2012.

# SÍ vann oddadystin

**Í løtuni er spenningurin størstur um plássini beint undir SÍ, sum hevur togað seg fýra stig frá restini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður ikki lætt hjá hinum liðunum at taka SÍ aftur í fremstu kvinnudeildini í flogbólti.

Um vikuskiftið vann SÍ sætta sigurin av seks møguligum, og at tað stóð nógv á hesaferð, so prógvaði hetta eisini styrkina á liðnum.

Dráttur beit nevnliga væl og virðiliga frá sær, tá tær vitjaðu í Sørvági. SÍ tók sær tey bæði fyrstu settini, men tær sluppu ikki at kanna sær bitin fyri gestunum.

Dráttur togaði seg nevnliga væl aftur, og tær noyddu eisini SÍ út í fimta og avgerandi settið, men her vóru tær á heimaliðnum tó ov sterkar.



*Saman við Drátti og Mjølni stríðist Fleyr um sessin beint undir SÍ. Í so máta hevur Fleyr týðandi uppgávu, tá tær taka móti SÍ komandi vikuskiftið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Togan um silvur

Tað bar við sær, at SÍ veruliga fekk slitið seg leyst í oddinum, og tó at kappingin enn er ung, so hava tær longu vunnið sær ein góðan fyrimun.

Men stríðið um plássið undir teimum er framvegis knallhart. Mjølnir, Dráttur og Fleyr hava øll átta stig eftir fyrstu seks dystirnar, og í løtuni tykjast innanhýsis uppgerðirnar millum hesi at fáa alstóran týdning.

Og tað fær helst eisini, um somu lið onkursvegna kunnu skala SÍ. Næstu royndina eigur Fleyr, sum tekur ímóti SÍ komandi vikuskiftið.

## Úrslitini

**Eik-ligan, kvinnur**

| | |
|---|---|
| Fleyr-ÍF | 3-1 (25-22, 17-25, 30-28, 28-26) |
| SÍ-Dráttur | 3-2 (25-23, 25-21, 19-25, 21-25, 15-10) |
| TB-Mjølnir | 0-3 (12-25, 22-25, 20-25) |

**Eik-ligan, menn**

| | |
|---|---|
| Fleyr-ÍF | 1-3 (17-25, 25-19, 23-25, 13-25) |

StÍF-Neistin 19-32 (11-14):

# Neistin kom ígongd

**Kvinnurnar hjá Neistanum hava enn ikki sannført í ár, men sunnudagin vístu tær nakað av tí, sum skal til fyri at røkka oddinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skuldi Neistin fylgja við hinum oddaliðunum, so vóru treytirnar púrasta greiðar. Dysturin á Skála móti StÍF skuldi vinnast.

Og tað var eisini heilt skjótt, at bláu gestirnir komu á slóðina. Fyrstu lítlu løtuna leypa Neistin avstað, og tann munin, sum tær tá vunnu, royndu tær at halda fast um allan vegin.

Tað var tó ikki fyrr enn eftir steðgin, at tað veruliga skrædnaði. Neistin royndi at leypa avstað alt fyri eitt, og seinastu løtuna av dystinum kom munurin veruliga til sjóndar. StÍF hevði tá slept vónini um at skapa nakað av spenningi, meðan Neistin hinvegin veruliga fann sær spæligleðina fram, soleiðis at tær øktu munandi um seinasta korterið.

Við sigrinum er Neistin nú aftur ájavnt Tjaldrinum á triðja plássinum. StÍF er framvegis næst niðast í deildini.

## FAKTA um dystin

**StÍF-Neistin 19-32 (11-14)**
**10 min:** 2-6
**20 min:** 7-11
**40 min:** 14-21
**50 min:** 17-26
**Málskjúttar**
**StÍF:** Ninna K. Johansen 6(1), Fríðrunn Danielsen 5(1), Poula D. Olsen 3, Bára Berthelsen 3, Sólfríð Christiansen 1, Rebekka Justinussen 1
**Neistin:** Anja Heinadóttir 10, Trine Mayland 8, Nicoleta R. Hansen 5, Heidi Maria Akselsen 4, Elin Staksund 2, Annika Ljóstein 2(1)
**Brotskøst:** StÍF 4, Neistin 2
**Útvísingar:** StÍF 2, Neistin 3
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen



# ÍF á talvuna

**Fleyr royndi at svara aftur, men fuglfirðingar sýndu gott spæl, tá teir vunnu sín fyrsta sigur**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bert ein dystur varð spældur í fremstu mansdeildini í flogbólti um vikuskiftið.

Hesin var í Havn, har ÍF kom vann síni fyrstu stig hetta kappingarárið.

Fuglfirðingar verða roknaðir millum heitastu FM-biðlarnar í ár, og tað eydnaðist teimum eisini at vinna dystin í Havn, hóast avrikið var heldur sveiggjandi.

Í løtum varð Fleyr nevnliga spælt niður og norð, men tá ÍF ikki megnaði at halda dampinum uppi, kundu vertirnir eisini taka sær eitt av settunum. Men í longdini fingu teir tó ikki gjørt tað stóra við mótstøðuna.

*Fuglfirðingar hava millum annað styrkt um liðið við Rúna Weihe, sum nú aftur spælir í heimligu kappingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*